# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

Maria fekk hesa fittu didduna 15. juli, hon eitur Bjørk, er fødd í Indien 22. mars 2004. Foreldur teirra eita Elly og Konrad Joensen og tey búgva á Eiði





29. august fingu Elma og Manni henda lítlabeiggjan. Foreldrini eru Nita Næs og Jens Mortan Mortensen, í Nesi - Hvalba. Hann vigaði 3720 gr. og var 53 cm langur. Eisini eigur hann tvær stórasystrar, Rebekku og Amaliu.



Nú eri eg komin! Eg kom til Føroyar úr Korea 26. august. Eg eri ein drongur, sum er føddur 3. mai 2006.Mamma og babba eita Maria Ellefsen Næss og Jens Tummas Næss. Vit búgva øll í Sandavági.



Hey eg eiti Jóel Kristiansen. Eg eri føddur í Etiopia tann 23/3 2004. Ættleiddur tann 7. apríl 2006. 26. mai kom eg til Føroyar við foreldrum mínum Annu og Hugo Kristiansen. Vit búgva í Runavík.



23. aug fingu Eyðrit Andreasen og Jón Jákupsson Holm, Argir eina dóttir. Hon vigaði 3320 gr og var 55 cm long. Her er tað ein stoltur pápabeiggi, ið situr undir prinsessuni

**Føðingar**

23. august fingu Birgit Gleðisheygg og Jóhan Vilhelm Lognberg, Argir, ein son. Hann var 53 cm. langur og vigaði 3500 gr.

24. august fingu Rannvá Madsdóttir og Simon Stenholm Nielsen, Miðvágur, eina dóttur. Hon var 52 cm. long og vigaði 3900 gr.

25. august fingu Dagmar Clothier og Mikkjal Helmsdal, Tórshavn, ein son. Hann var 54 cm. langur og vigaði 3850 gr.

26. august fingu Anna Jacbsen og Hans Petur Joensen, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 52 cm. long og vigaði 3700 gr.

26. august fingu Eyðvør Thomsen og Magnus Jakobsen, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 55 cm. long og vigaði 3950 gr.

28. august fingu Hildigunn Joensen og Egil Petersen, Kvívík, ein son. Hann var 51 cm. langur og vigaði 3300 gr.

29. august fingu Annika Jónsveinsdóttir og Ragnar Nolsøe, Trongisvágur, eina dóttur. Hon var 51 cm. long og vigaði 3325 gr.

29. august fingu Sunnrid Poulsen og Ragnar H. Thomsen, Norðskála, ein son. Hann var 54 cm. langur og vigaði 4540 gr.

29. august fingu Helena og Fróði Danielsen, Toftir, ein son. Hann var 54 cm. langur og vigaði 4000 gr.

30. august fingu Turid og Sakaris Frederiksen, Hoyvík, ein son. Hann var 56 cm. langur og vigaði 5000 gr.

# Julianna Winther í Skopun 50 ár

Sunnudagin 3. september fyllir Julianna Winther 50 ár. Julianna er fødd og uppvaksin og gekk í barnaskúla á Sandi, hon er yngsta dóttir Martin Kristian Hentze, nevndur Martin hjá Evu-Peturi á Sandi, og Maren Susanne, f. Jóhannesen, vanliga nevnd Marsanna, dóttir Juliannu og Dánjal í Katrinarstovu í Funningi.

Julianna gekk framhaldsdeild á Meginskúlanum á Sandi.

Julianna hevur altíð verið so arbeiðssom. Aftaná skúlatíð arbeiddi hon í bakarínum hjá Annfinni í Soylu, arbeiddi eisini í handlinum á Grótheiðum hjá Mariannu og Jóhan Petur Hentze. Eftir loknan skúla arbeiddi hon á flakavirkinum í Skopun. Í 1978 giftist hon við Joen Jacob Winther. Tey búgva í Skopun og eiga tríggjar dreingir: Petur Hans, Martin og John Reidar, sum allir búgva í Skopun.

Í 1989 fór Julianna við manni og



børnum til Danmarkar at nema sær útbúgving sum sjúkrahjálpari. Hon lærdi í Roskilde og kom heim aftur í 1990, tá hon fór at arbeiða á Lágargarði í Havn. Hon arbeiddi har í gott 3 ár, til heimini á Sandoynni vórðu tikin í brúk, tá fór hon suður at arbeiða á Áargarði á Sandi, nøkur ár seinri fór hon aftur til Danmarkar við familjuni, at nema sær meiri vitan innan útbúgvingina, tá var tað til social sundhedsassistent, í dag eitur tað heilsurøktari, lærutíðin var í Herning.

Hon kom heim aftur og arbeiðir framvegis á Áargarði á Sandi, og henni dámar arbeiðið millum tey gomlu sera væl.

Julianna eigur 3 ommubørn, Rósu Juliannu, Brandur og lítla Joen Jacob, sum eru sera heppin at eiga eina ommu, sum er so góð við tey.

Góða Julianna systi hjartaliga tillukku og Harrans ríku signing fyri dagin og komandi dagar.

*Altíð ert tú hjálpsom, altíð ert tú glað*
*Hjartalag so gott sum fáur hevur sæð*
*At hugna um øll okkum, fært tú væl í lag*
*Tankar tínir fevna okkum øll – hvønn dag.*

**Marin systi**

# Julius sjeyti

Summi fólk eru meira enn onnur bygdamyndir ella býarmyndir. Hví so er, kundu vit ivaleyst hugleitt leingi um. Tað verður ikki í hesum umfarinum.

Men mánadagin 4. september verður ein sonn bygdamynd á Toftum 70 ár. Tað er Julius Olsen.

Julius hevur sera stóran tokka til sína heimbygd, har hann hevur búð alt sítt lív. Nú pápin Vensil er farin og mamman Nanna býr á Eysturoyar Røktar- og Ellisheimi, býr Julius á Eldrasambýlinum Vesturskin, har hann trívist væl og á sín serliga hátt skapar trivna fyri tey fólk, ið har búleikast.

Julius hevur altíð havt stóran áhuga fyri fótbólti og tá dystur er á Svangaskarði, hevur hann ábyrgdina av hornafløggunum. B68 er hansara hjartabarn og ikki er ov nógv sagt, at fyri okkum B68-viðhaldsfólk er Julius



ein savningardepil og eitt samleikaprógv. Hetta veit Julius sjálvur og hann hevur avgjørt einki ímóti at hava hendan leiklutin.

Líka lítið er at ivast í, at Julius hevur eitt heilt serligt pláss í hjartanum hjá føroyskum dómarum. Hann er helst einasti áskoðari í landinum, sum sleppur at ganga innanfyri girðingina meðan dystur er. Allan dystin á tamb gongur hann og válar aftur og fram eftir sjálvari síðulinjuni og rópar á spælararnar. Julius hevur snøgt sagt vunnið sær søgulig rættindi á síðulinjuni.

Ja, fyri dómararnar er tað so sjálvsagt at Julius er innanfyri girðingina tá B68 spælir heimadyst, at onkuntíð tá tað hevur borist honum undan at koma til dyst, hevur dómarin spurt eftir honum. Hvussu stóran týdning B68 hevur fyri Julius, er sjón fyri søgn.

70 ára dagurin verður hildin við døgurða á Svangaskarði mánakvøldið klokkan 19. Julius hevur glett seg ómetaliga nógv til hendan dagin og hann vónar, at nógv fólk taka sær stundir at koma í B68-húsið í føðingardag.

Hjartaliga tillukku Julius og takk fyri manga góða løtuna.

**B68-ari**

**Dagurin**

**2. september.** Elisa, profeturin sum kongabøkurnar í Gamla testamenti vita at greiða frá. Í gomlum álmanakkum var navnið skrivað Eliseus, sum kemur av latínska bíbliutýðingini Vulgata Eliseus hevur verið brúkt sum mansnavn í Føroyum. Navnið merkir Guð hevur hjálpt, ella Jahve er Guð mín.

**3. september.** Seraphia. Kristin trælkvinna úr Sýriulandi, sum varð hálshøgd fyri trúar sakir.

**4. september.** Teodosia. Navnið er helst komið upp í álmanakkan í staðin fyri mansnavnið Teodorius, tí at hann hevði longu 2. apríl sum halgidag.